Kappingareftirlitið

**Uttanríkis- og Vinnumálaráðið**
Gongin 7
Postboks 377
FO-110 Tórshavn

Tórshavn, tann 20. september 2016

**Svar til umbøn frá UVMR um týdningin av eini miðsavnaðari alivinnu og veitarum tess**

Í telduposti tann 13. September 2016 hevur Uttanríkis- og Vinnumálaráðið biðið Kappingareftirlitið um at eitt upprit, um hvønn týdning tað hevur í kappingarhøpi fyri veitarar til alivinnuna, at stórur partur av alivinnuni er miðsavnaður í einum alifelagi.

Fyri meta um hvønn týdning miðsavningin av føroysku alivinnuni hevur, er í fyrsta lagi neyðugt at hygggja at hvussu marknaðurin hjá einstøku veitarum sær út.

Í flestu førum eru einstøku veitararnir í teirri støðu at teir veita til fleiri aðrar vinnur enn alivinnuna - eisini uttanlanda. Hinvegin kann ikki síggjast burturfrá, at alivinnan er stór í føroyskum høpi, og tískil er ikki óhugsandi at hon kann hava stóran týdning fyri ávísar fyritøkur.

Kappingareftirlitið hevur góðkent fleiri samanleggingar innan alivinnuna. Tvær tær størstu vóru tá Bakkafrost yvirtók ávikavist Vestlaks og Havsbrún. Í hesum sambandi var innheintað tilfar um veitarar hjá Bakkafrosti. Um hugt verður eftir størstu veitarunum hjá Bakkafrosti kann staðfestst, at stór miðsavning er á veitarasíðuni, t.d. fóður[1], heilivágur[2], nótir[3], uttanlands flutningur[4], brennievni[5], el[6], kunningartøkni[7]. Hinvegin eru tó eisini veitarar, sum eru í vinnugreinum við virknari kapping. T.d. innalands vørukoyring, kavaravirksemi og smiðarbeiðið.

Vandin við verandi støðu innan alivinnuna er, at Bakkafrost kann gera sær dælt av keyparamakt. Keyparamakt er tilstaðar tá ein keypari kann trýsta seljarar til at lækka prísin undir eitt støðið, sum vildi verið á einum marknaði við virknari kapping.

[1] P/f Havsbrún
[2] Apoteksverkið
[3] Vónin og Sílnet
[4] Faroe Ship, Smyril Blue Water. Samskip
[5] Magn & Effo
[6] SEV
[7] Formula, Elektron, Nema

Í búskaparfrøðini hevur verið vanligt at lýsa árini av keyparamakt við monopsony myndlinum, har ein keypari stendur yvirav fleiri veitarum. Sambært hesum ástøði vil keyparin avmarka sín eftirspurning, eins og monopolisturin avmarkar sítt útboð, fyri á tann hátt at fáa ein lægri prís.




Uttan at fara serliga ítøkiliga inn í myndilin, so er avleiðingin av framferðini hjá keyparanum, at eitt samfelags tap verður (gult øki), og at keyparin fær ein størri part av yvirskotinum í mun til marknaðarprísin á einum virknu marknaði (grátt økið).

Samfelagsligi missurin kemur av at færri vørur verða keyptar og til ein hægri prís. Tað, at keyparin tekur vinning frá seljarum er ikki í sær sjálvum ein samfelagsligur missur, men ein umskipan av yvirskoti.

Myndilin hevur tað fortreyt, at keyparin avmarkar sítt keyp fyri at fáa lægri prís. Í veruleikan er hetta ikki altíð galdandi. T.d. liggur tað neyvan nøkur optimering í, at avmarka nýtsluna av heilivági fyri at fáa ein lægri prís, tí her eru eisini onnur atlit at taka hædd fyri.

Somuleiðis tekur myndilin ikki støðu til um seljarin sjálvur hevur tingingamakt ella ikki. T.d. kunna báðar síðir verða miðsavnaðar. Afturat hesum skal vísast á at myndilin heldur ikki tekur atlit til, at keyparin ger fleiri keyp, og tískil skal tingast við fleiri seljarar. Hetta gevur møguleika fyri ymiskum avtalutreytum og prísum alt eftir hvørja støðu seljarar eru í.

Hesi viðurskifti gera, at hóast at keypari hevur keyparamakt, so er ikki víst at nakað serligur samfelagsligur missur stendst av støðuni. Tann ójavni, sum møguliga verður eftir, er umskipanin av yvirskotinum millum keypara og seljarar.

Hesin ójavni er treytaður av valdsbýtinum millum keypara og seljarar. Í teimum førum, har seljarin er monopolist ella duopolist, kann hesin nýta sína seljara makt til at viga uppímóti keyparamaktini. Sum áður víst á, so eru teir størri veitararnir hjá Bakkafrost mono- ella duopolistar, og tað er tí óvist um hesir hava stórvegis trupulleikar av at stórur partur av alivinnuni er miðsavnað í einum felagi. Hinvegin kann hugsast, at keyparamaktin hjá Bakkafrosti spælir ein leiklut, tá talan er um teir minnu veitararnar, sum eru í virknari kapping við aðrar veitarar. Tað er tó neyðugt at vísa á, at tað eru onnur viðurskifti, sum kunna gera seg galdandi, og sum hava við sær at keyparamaktin hjá Bakkafrost mótvegis hesum veitarum kann verða avmarkað.

Í fráboðan, sum var send Kappingareftirlitinum í sambandi við at Bakkafrost yvirtók Havsbrún framgekk, at tá tað kom til aliframleiðsluna, so fóru 81% av útreiðslunum til veitarar, sum antin vóru í

eini monopol ella duopolstøðu. Av hinum 19%, ið fór til ein óútgreinaðan skarða av veitarum er ógreitt hvussu marknaðarbygnaðurin fyri hesar veitarar var. Fyri nøkrum árum síðani gjørdi Hagstovan og Kappingarráðið eina kanning sum staðfesti at 80% av føroysku vinnugreinunum vóru antin duopolir ella monopolir, so sannlíkt er at eisini millum smærri veitararnar til alivinnuna, eru hesar marknaðarbygnaðir at finna.

Tað at útreislurnar hjá Bakkafrost í størsta mun stava frá keypi frá veitarum sum hava mono- ella duopolstøðu ger, at keyparamaktin møguliga ikki hevur so stóran týdning. Har, sum Bakkafrost hevur møguleika at brúka keyparamakt er sostatt yvirfyri teimum veitarum í eru virknir á marknaðum við virknari kapping. Av tí hesin partur er avmarkaður av samlaðu útreiðslunum, kann spurningur tí setast við um, og í hvønn mun, Bakkafrost hevur nakað incitament til at pressa hesar prísir niður á eitt órimiligt støði.

Samanumtikið metir Kappingareftirlitið at tað er torført at siga nakað endaligt um hvønn týdning tað hevur fyri undirveitarar í føroysku alivinnuni, at stórur partur av alivinnuni er miðsavnaður í einum felag.

Tað ber ikki til at koma til ta niðurstøðu at miðsavningin í alivinnuni hevur ført til at veitarar til alivinnuna eru trýstir, uttan at kanna støðuna hjá útboðssíðuna gjøllari.

Einasta ábending sum Kappingareftirlitið hevur um støðuna hjá útboðssíðuni er, at ongin veitari hevur vent sær til okkara hesum viðvíkjandi.

Terje Sigurðsson
*deildarstjóri*